# Fleiri eru um boðið



*- Fyrst og fremst er mín arbeiðssetningurin at fáa sum mest burtur úr teimum leikarum, sum Føroyar eiga, men harafturat skal eg sjálvandi eisini hugsa um framtíðina hjá liðnum, sigur Allan Simonsen*

**Hóast tað framvegis restar ein dystur hjá landsliðnum í hesari undankappingini, so heldur landsliðsvenjarin longu nú, at vit kunnu ikki annað enn vera nøgd um úrslitini, sum liðið hevur fingið higartil**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*
*– Bled, Slovenia*

Enn er einki staðfest um venjaraspurningin hjá føroyska landsliðnum, og tað tykist heldur ikki gjørligt at fáa nakrar ábendingar um, hvørt Allan Simonsen fer at halda fram í starvinum.

Einasta, sum kann sigast við vissu er, at í hesum sáttmálaskeiðinum verður dysturin leygardagin tann seinasta hjá lítla dananum.

Eftir venjingina hóskvøldið, sum annars varð avbrotin av einum óvanliga grovum æli, fingu vit orðið á venjaran, og bóðu hann taka saman um tey úrslit, sum landsliðið hevur havt higartil í undankappingi. Einari undankapping, sum undir øllum umstøðum hevur verið søgulig á tann hátt, at Føroyar ongan tíð áður hava vunnið sær somikið nógv stig, sum hesaferð.

- Yvir høvur haldi eg, at vit kunnu vera nøgdir um úrslitini. Vit hava spælt nakrar heilt góðar dystir, og sjálvt um alt ikki hevur verið eins gott, so hava vit fingið nøkur góð stig, og fleiri ferðir hevur tað eisini verið heilt nær við, at vit hava skapt eina veruliga sensatión.

## Mugu hugsa frameftir

Verður hugt at hesum báðum seinastu árunum, so er landsliðið eisini broytt rættiliga nógv hesa tíðina. Spakuliga eru fleiri nýggir mans komnir inn í hópin, og fleiri hava tulkað hetta tann vegin, at venjarin hevur sett sjøtul á eitt slag av endurnýggingararbeiði, eftir at hann annar í eini fýra ár hevur hildið rættiliga fast um leikararnar í hópinum.

Sjálvur er venjarin ikki ósamdur í hesum, men hann leggur tó dent á, at hetta einki hevur at gera við, hvørt venjarin komandi árið eitur Allan Simonsen ella ikki.

- Nógvu broytingarnar hesi árini eru fyrst og fremst íkomnar av, at fleiri av vanliga føstu leikarunum onkursvegna hava verið noyddir at geva avboð.

- Til dømis hava tað verið heilt nógv avboð til dystin hesaferð. Bæði orsakað av skaðum og leikbannum, og ti eru vit noyddir at taka fleiri nýggjar mans við. Soleiðis hevur støðan verið nærum hvørja ferð, og so mugu vit bara vóna, at væntandi royndirnar ikki gerast alt ov sjónligar leygardagin.

Hvussu er og ikki við hesum, so hevur seinasta árið ella so kortini víst, at talan í hvussu so er um einar tveir til tríggjar leikarar, sum veruliga hava bitið seg fastar í hópinum. Leikarar sum uttan iva eina langa framtíð á landsliðnum.

- Tað er rætt, men tað síggja vit á landsliðnum so avgjørt eisini sum okkara uppgávu. Tað er altíð neyðugt við einari leypandi útskifting av leikarum. Fyrst og fremst er mín arbeiðssetningurin at fáa sum mest burtur úr teimum leikarum, sum Føroyar eiga, men harafturat skal eg sjálvandi eisini hugsa um framtíðina hjá liðnum, og tað haldi eg, at vit hava gjørt »stille og roligt«.

- Tað nyttar jú einki, um alt liðið skal skiftast í senn, tá broytingarnar eina ferð skulu henda. Tað megnar liðið snøgt sagt ikki at bera, og eg haldi eisini, at teir meira royndu leikararnir, sum so hvørt eru givnir á landsliðnum hava skilt hetta.

## Eingin dumpaður

At broytingarnar hava verið somikið stórar hesi bæði árini, hevur tó samstundis prógvað, at føroyski landsliðshópurin er rættiliga breiður. Har tað áður var talan um einar 20 leikarar, sum vóru evni til landsliðið, so líkist hetta tal meira 30 í ár, og enn er tað so ikki komið fyri, at ein ungur leikari hevur dumpað til próvtøkuna, tá hendar skal standast á vøllinum.

Allan Simonsen er eisini bæði fegin og errin um, at ungu menninir hava staðið seg somikið væl.

- Eg haldi veruliga, at nýggju menninir hava gjørt eitt sera gott arbeiði. Hóast tað ikki altíð kann vera rúm fyri øllum, so sært tú til dømis hesaferð, at vit hava einar seks meira ella minni nýggjar leikarar við, og at hesir kunnu koma uttan stórvegis hóvasták ber í hvussu so er boð um, at hópurin er vorðin nakað væl breiðari, og hetta haldi eg vit eiga at gleðast um, sigur føroyski landsliðsvenjarin at enda.

Soleiðis fæst enn eingin ábending um, hvørt hesin heldur fram í starvinum komandi árini, men undir øllum umstøðum tykist arbeiðsgrundarlagið hjá einum komandi venjara at vera komið í rættlag.



*Rógvi Jacobsen er ein teirra, sum seinastu tvey árini er komin alt meira við í landsliðshitanum*





*Milan Cimburovic, jugoslaviski ungdómsvenjari á Tvøroyri, er ein av teimum heldur jugoslaviska ítróttarblaðið, Sport Journal. Í seinastu útgávuni hevur jugosvlaviski landsliðsvenjarin eitt herðaklapp til føroyingar*

# Føroyingar spæla altíð við hjartanum

**Jugoslaviski landsliðsvenjarin heldur, at tað er óneyðugt at geva føroysku landsliðsspælarunum pening fyri at fáa eitt gott úrslit ímóti Slovenia í dag. Føroyingar geva seg altíð 100%, sigur hann**

LANDSLIÐS-
FÓTBÓLTUR
*Áki Bertholdsen*

– Tá ið føroysku landsliðsspælararnir lata seg í tjóðarbúnan geva teir eg 100%. Tað nytist teimum ikki stuðul frá okkum til.

Tað sigur jugoslaviski landsliðsvenjarin, Dejan Savicevic, í samrøðu við jugoslaviska ítróttarblaðið Sport Journal.

Milan Cimburovic, jugoslaviskur ungdómsvenjari á Tvøroyri, var so beinasamur at týða greinina fyri okkum.

Úrslitið av landsdystinum ímillum Føroyar og Slovenia fær alstóran týdning fyri Jugoslavia, tí Føroyar skal taka stig fá Slovenia, skal tað eydnast Jugoslavia at vinna beinleiðis pláss í HM umdanspælinum.

Blaðið hevur spurt jugoslaviska venjaran, hvussu møguleikarnir eru hjá føroyingum at fáa stig ímóti Sovenia.

Jugoslvavia skal spæla heima ímóti Luxemburg, men tað verður mett at vera sjálvsagt, at teir vinna.

Eitt nú spyr blaðið venjaran, um tað kann koma uppá tal at stuðla føroysku spælarunum fíggjarliga fyri at eggja temum til at geva eitt sindur eyka ímóti Slovenia.

Men tað heldur venjarin er óneyðugt.

Hann sigur, at hann hevur verið í Føroyum og at føroyingar eru eitt ógvuliga rættskaffið fólkaslag. Tá ið føroysku spælararnir fara í tjóðarbúnan geva teir seg altíð 100%. Føroyingar spæla við hjartanum og stríðast altíð til seinasta bríksl, so tað er óneyðugt at eggja teir við pengum. Hann heldur tó, at møguleikin fyri, at føroyingar fáa stig ímóti Slovenia er ikki stórur, men teir trúgva upp á tað til tað síðsta.

## Nógvir eru ikki tøkir hjá Slovenia

**Áhugin í Slovenia fyri Føroya dystinum er so mikið stórur, at øll atgongumerkini vórðu seld eftir einum tíma**

SLOVENIA
*Jóannes Hansen*

Í Slovenia er áhugin fyri landsdystinum ímóti Føroyum ógvusligur. Fjølmiðlarnir gera nógv burturúr, og áhugin millum áskoðararnar er so mikið stórur, at øll atgongumerkini vórðu rivin burtur eftir minni enn einum tíma.

Tað er møguleiki hjá slovenum at kvalifisera seg til HM endaspælið í dag, men so skal nógv ganga upp. Í fyrsta lagi skulu teir vinna ímóti Føroyum, og so skal Russland samstundis tapa á heimavølli ímóti Sveis. Tað er lítið sannlíkt, at Russland ikki í hvussu so er fer at megna javnleik og harvið beinleiðis at kvalifisera seg til endaspælið í Japan og Suðurkorea.

Møguleikin hjá Slovenia er, at teir við sigri á føroyingum sleppa upp í part í eyka møguleikanum, sum átta europeiskar tjóðir, ið enda næstfremst í undankappingini, fáa. Í einum heima og einum útidysti fara fýra teirra at kvalifisera seg til endaspælið.

### Fleiri skaddir og leikbannaðir

Slovenarar eru ivaleysa góðir at vinna á Føroyum, men teir hava verið manningarliga betri fyri, enn teir eru hesa ferð.

Stóri stjørnuspælarin hjá Slovenia hevur seinnu árini verið Zlatko Zahovic. Hann er so mikið skaddur, at tað er rættuliga ivasamt, um hann verður ímillum teir fyrstu ellivu í dag, og um hann verður á vøllinum, so verður hann ikki førur fyri at spæla við fullari ferð.

Tá Slovenia var í Føroyum fyri einum góðum ári síðani, var Milan Osterc settur á vøllin í 70. minutti. Hann skoraði í 86. minutti til 2–0. Í hesi vikuni varð hann skaddur undir venjing, og tað verður mett at vera ivasamt, um hann verður tøkur.

Tað er púra greitt, at fýra spælarar ikki verða við, tí teir eru leikbannaðir. Hesir eru Miran Pavlin, Arnir Karic, Ales Ceh og Milenko Acimovic. Ales Ceh er liðformaður á landsliðnum, og Karic og Pavlin vóru á liðnum, sum fyri einum góðum ári síðani spældi 2–2 á Svangaskarði.

Hetta vil við øðrum orðum siga, at tað er rættuliga sannlíkt, at Slovenia sammett við dystin í Føroyum í hvussu so er fer at broyta liðið á helvtini av plássunum.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!